## Gunnar Nielsen:

# Gott at eg IKKI rakaði mær

**FÓTBÓLTUR**

**– Kanska var tað ikki so býtt at vera órakaður handan dagin, tí tað hevur givið útlendingum ein mynd av føroyingum sum villmenn og víkingar, sum veruliga vilja nakað, sigur Gunnar Nielsen um løtuna, hann fekk í Premier League**

Tróndur Arge

Tann 24. apríl 2010 kom Føroyar á Premier League heimskortið, tá Gunnar Nielsen avloysti skadda Shay Given í Manchester City málinum. Gunnar Nielsen helt málið reint, og fjølmiðlarnir vóru á tremur við søguni um Gunnar og vildu hava at vita, hvussu tað bar til, at ein leikari úr Føroyum kundi enda mitt í einum Champions League stríðið í Premier League.

Í kvøld hittast Arsenal og Manchester City aftur á Emirates Stadium í London. Nógv vatn er runnið í ánna síðani lagnudagin í apríl í fjør. Gunnar er blivin fyrstaval á føroyska landsliðnum, hann hevur verið leigaður til Tranmere Rovers, men skaðar og frost hava steðgað honum í at spæla tað mesta av tíðini. Hann hevur eisini longt sáttmálan við Manchester City við einum ári.

### »Glaður fyri at eg ikki rakaði mær«

Í yvirskriftini á Sosialinum stóð: »Eg skuldi havt rakað mær.« Runt allan heimin fóru myndirnar av nøkrum, ið líktist mest einum víkingi í kríggi, og eyknevnið »The Viking« varð fleiri ferðir nýtt um havnarmannin. Í dag er Gunnar Nielsen ikki so vísur í, um hann skuldi havt rakaða sær.

– Kanska var tað ikki so býtt at verða órakaður handan dagin, tí tað hevur givið útlendingum ein mynd av føroyingum sum villmenn og víkingar, sum veruliga vilja nakað. Sokallaðir »pretty boys« eru tað nokk av í Premier League, sigur Gunnar Nielsen í einum løttum tóna og við einum smíli.




*Sosialurin, mánadagin 26. apríl 2010*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

### Fer at hyggja í sjónvarpinum

Klokkan 19.45 í kvøld fara leikararnir hjá Arsenal og Manchester City á vøllin á Emirates Stadium, men tað verður uttan Gunnar Nielsen, sum tó ferð at hyggja eftir dystinum í sjónvarpinum.

– Eg kom at hugsa um tað nú ein dagin, at tað var í júst sama dystinum í fjør, at eg slapp á vøllin á fyrsta sinni. Eg fari sjálvandi at hyggja, og tað verður við einar stoltari kenslu, tí tað var ein stór løta fyri meg, tá eg slapp á vøllin, sigur Gunnar Nielsen úr telefonini á Carrington, sum er venjingarstøðin hjá Manchester City.




Manchester City valdi tá á sinni, at leiga ein málmann, sum gjørdi, at Gunnar Nielsen ikki slapp at royna seg aftur á besta liðnum. Men uttan fyri City of Manchester flokkaðust fólk rundan um føroyska málmannin eftir dystir. Eisini á bæði heimasíðuni og á vikublaðnum hjá Manchester City var nógv skrivað um føroyingin í heimsins ríkasta felagið. Men hvussu er støðan nú?

## ...gevur eina mynd av føroyingum sum villmenn og víkingar

– Tað er sjálvandi ikki eins nógv fokus á mær, sum tað var í tíðini eftir dystin á Emirates Stadium. Tó so, so hendir tað seg, at fólk kenna meg aftur og eg fái onkra viðmerking, sigur Gunnar Nielsen.

### Einsamallur á Carrington

Gunnar hevur í fyrru hálvu av hesum kappingarárinum verið útleigaður til Tranmere Rovers, sum spælir í League One, sum er triðjbesta deildin í Onglandi. Tann sáttmálan er nú útgingin og Gunnar er aftur í Manchester City.

– Beint nú siti eg einsamallur í skiftirúminum á Carrington, meðan hinir á liðnum eru í London og fyrireika seg til dystin í kvøld. Eg eri fyribils aftur í Manchester City, men eg og umboðsmaðurin hjá mær, Jákup í Stórustovu, hyggja upp á allar møguleikar í løtuni. Tað eru nógvir leikarar, ið eru leysir á marknaðinum, so tað er ikki bara sum at siga tað, at finna eitt felag, sigur Gunnar Nielsen.

### Umhugsar eisini onnur lond enn Ongland

Fyribils hevur Gunnar spælt í Onglandi síðani hann skiftið til Blackburn, men nú opnar hann eisini fyri møguleikan, at spæla aðrastaðni enn í Onglandi.

– Ja, eg hyggi sum sagt upp á allar møguleikar, men tað er ikki óhugsandi, at eg kundi farið til okkurt annað land at spæla bólt, men tað hendir so nógv í løtuni, at tað er ógjørligt at siga nakað um tað, sigur Gunnar Nielsen.

Tíðin í Tranmere Rovers hevur ikki livað upp til tað, ið Gunnar hevði vónað.

– Fyrst gjørdist eg skaddur í tríggjar mánaðir og báður ferðir við landsliðnum. Síðani kom kuldin og útsetti fleiri av okkara dystum. Millum annað fóru vit ein langan busstúr úr Liverpool heilt til London, bara fyri at fáa at vita, at dysturin var avlýstur, sigur Gunnar vónbrotin á málinum.

*trondur@sosialurin.fo*